## Uppsagnir hjá Shell

Niðurlendska oljufelagið Royal Dutch Shell kunngjørdi í gjár, at felagið ætlar at siga 2.000 starvsfólkum upp hetta til árslok 2011. Herfyri kunngjørdi felagið, at 1.000 fólk skuldu sigast upp sum lið í einari stórari bygnaðarbroyting, men nú er talið broytt til 2.000. Einki verður sagt um, hvør verður uppsagdur. Peter Voser, forstjóri, sigur við fjølmiðlarnar, at málið hjá leiðsluni er at skarva eina milliard dollarar av rakstrarútreiðslunum longu í ár og at spara á leið tað sama næsta ár.



## Vár í Hong Kong

Vanliga gleða fólk seg til, at veturin fær ein enda, og at várið skal taka við, men tað er ikki allastaðni, at øll eru líka fegin um várið. Sum eitt nú í Hongkong. Har hevur várið ofta nógvan mjørka við sær, og hann kann vera so mikið tjúkkur, at at bara tey hægstu háhúsini stinga uppúr. Tann tjúkki mjørkin darvar harafturat ferðsluni bæði á landi og sjógvi og ikki minst í luftini. Hong Kong er týðandi samferðsludepil, men tá vármjørkin liggur, noyðast nógv flogfør at brúka floghavnir aðrastaðni, og stór farmaskip liggja uttanfyri og bíða eftir betri sýni.



*Meðan útflutningurin stendur í stað í virði, er innflutningurin minkaður í januar í ár sammett við januar í fjør. Eitt nú er bólkurin beinleiðis húsarhaldsvørur minkaður 6% í innflutningi – tað vil siga matvørur, millum annað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nøgdin minkað – virðið tað sama

**Hagtøl fyri útflutningin fyri januar vísa, at meðan nøgdin er minkað í stórum, er virðið á útflutta fiskinum tað sama**

ÚTFLUTNINGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Uppgerðin hjá Hagstovuni fyri inn- og útflutning í januar í mun til sama mánað í fjør vísa, at meðan samlaði fiskavøruútflutningurin minkaði heili 11.852 tons, svarandi til 46%, var útflutningsvirðið hinvegin hitt sama.

Í virði eru tað serliga skeljafiskur og uppisjóvarfiskur, ið eru minkað nógv í virði, men talan er um ávikavist smáar nøgdir og bíligan fisk. Í virði er útflutningurin av skeljafiski í januar minkaður við 8,2 milliónum krónum, úr 9,7 niður í 1,5 milliónir krónur. Tað svarar til 84%.

Fyri uppisjóvarfiskin er talan um eina minking í virði frá 37,6 niður í 15,5 milliónir krónur, ið er eitt fall á 59%. Annar fiskur og fiskaúrdráttir minka eisini í virði úr 21,2 niður í 16,4 milliónir krónur, svarandi til 23%. Eisini innan bólkin flundrufiskur er talan um eina lítla minking, úr 10,6 niður í 9,8 milliónir krónur, svarandi til 8%.

Hinvegin síggja vit eina lítla øking í útflutningsvirðinum á bornfiski, úr 112,9 upp í 115,5 milliónir krónur, og tað svarar til 2%.

Bjargingin liggur í økta útflutningsvirðinum á alifiski, ið økist úr 59,6 upp í 92,9 milliónir krónur. Tað svarar til eina øking á 56%.

Samlaða virðið á fiskavøruútflutninginum øktist frá januar 2009 til januar 2010 úr 251,5 upp í 251,6 milliónir krónur, ið er ein øking, ið ikki verður skrásett sum øking í prosentum.

Útflutningurin av bólkinum aðrar vørur minkaði 7,2 milliónir krónur niður í 14,5 milliónir, ella 67%, meðan útflutningur av skipum vaks úr 12 upp í 190 milliónir krónur – svarandi til1483%.

### Nógv færri tons

Um hugt verður at útflutninginum í tonsum, er støðan ein heilt onnur. Bara innan alifisk er tonsatalið størri í januar í ár sammett við í fjør. Talan var um eina øking í tonsatali 182, úr 2437 upp í 2619, svarandi til 7%.

Allir aðrir høvuðsbólkar innan fiskavørur eru minkaðir í tonsum. Størsta prosentvísa minkingin er fyri skeljafisk, sum minkar 97%, úr 741 niður í 22 tons. Men eisini bólkurin uppisjóvarfiskur minkar í stórum, úr 10.961 tonsum niður í 2.989 tons. Tað svarar til 73%.

Tølini fyri flundrufisk eru smá, men eisini innan tann bólkin minkar útflutningurin í tonsum, úr 373 niður í 217 tons, ella 42%. Eisini fyri botnfisk er talan um eina minking, úr 6.882 niður í 5.182 tons, og tað svarar til 25%.

Eisini í bólkinum annar fiskur og fiskaúrdráttir er talan um minking, úr 4.611 niður í 3.124 tons. Tað er ein munur á 1.487 tons, svarandi til 32%.

Samlað er talan um eina minking í útflutningi av fiskavørum á 11.852 tons, úr 26.005 niður í 14.153 tons. Tað er ein minking í prosentum á 46.

Men hóast hesa stóru minkingina í tonsatalinum, er útflutningsvirðið ikki minkað, og tað merkir, at fiskaprísurin er munandi hægri í januar í ár sammett við januar í fjør.

Verða skipini tald við í útflutningsvirðið er talan um eina øking í útflutninginum frá januar 2009 til januar í ár upp á 163,6 milliónir krónur, svarandi til heili 57%.

### Innflutningurin minkar

Uppgerðin hjá Hagstovuni umfatar eisini innflutningin í januar í ár sammett við januar í fjør.

Talan er um stóra minking og stóra øking í ymsu bólkunum, men samanlagt er talan um eina minking á 6%.

Størstu minkingina í prosentum finna vit innan bólkin skip og flogfør, men upphæddirnar eru sera smáar. Talan er um eina minking upp á 82%, men í virði er minkingin úr 600.000 krónum niður í 100.000 krónur.

Bólkurin til hav- og landbúnað minkar eisini nógv, úr 16,6 niður í 8,6 milliónir krónur, svarandi til 48%.

Áhugavert er, at meðanbrennievni minkar úr 71,6 niður í 58,4 milliónir krónur – tað er 19% - so er innflutningurin av bilum øktur í januar í ár sammett við januar í fjør úr 3,0 upp í 6,8 milliónir, svarandi til 126%. Sum sæst er talan tó um lutfalsliga smá tøl.

Næststørstu økingina í innflutningi í prosentum er í bólkinum rávøra til fiskavirking, sum veksur úr 4,7 upp í 10,5 milliónir krónur. Tað er ein øking upp á 123%.

Áhugavert er eisini, at bólkurin til beinleiðis húsarhaldsnýtslu minkar. Har fluttu vit inn í januar 2009 fyri 86,1 millión, meðan virðið í januar í ár er minkað niður í 81,1 millión krónur. Tað er ein minking á 6%.

Samanlagt er innflutningsvirðið í januar í ár 260,8 milliónir, meðan samlaða útflutningsvirðið er 448,8 milliónir krónur – íroknað ein útflutning av skipum á 190 milliónir krónur.

Tað sæst á heimasíðuni hjá Hagstovuni.